


www.oljan.fo

**Jan Müller** 21 - 09 - 2011

# Irak framtíðarinnar oljuveldi

Ein nýggj frágreiðing hjá ST avdúkar, at Irak hevur eina av heimsins størstu oljugoymslum í sínari undirgrund, og at landið kann blíva líka ríkt sum grannalandið Saudiarabia. Tað eru ikki smá orð, ST brúkar í frágreiðingini um Irak sum oljuland. Landið verður umrøtt sum "framtíðarinnar oljuveldi", og sagt verður, at landsins oljugoymslur eru so stórar, at tær kunnu fáa beinleiðis og stóra ávirkan á prísirnar á heimsmarknaðinum. Irak framleiðir í løtuni eitt sindur oman fyri 2,5 milliónir tunnur av olju um dagin, men irakskir stjórnartalsmenn hava sagt, at tey næstu fimm árini verður landið ført fyri at fimmfalda framleiðsluna, so hon verður einar 12 milliónir tunnur um dagin. ST sigur í frágreiðingini, at við teimum ovurhonds stóru oljugoymslunum í undirgrundini kann Irak blíva líka ríkt sum Saudiarabia. Men heimsfelagsskapurin ger samstundis vart við, at størri oljuframleiðsla útvegar ikki fólkinum vælferð. Tí má landið leggja seg eftir at framleiða annað enn olju eisini, sigur ST. -Trupulleikin er, at oljan kann rinda 90 prosent av útreiðslunum á fíggjarlógini, men at hon bara gevur arbeiði til eitt prosent av arbeiðsmegini, og tí eru tað bara tey fáu, sum kenna ágóðan av oljuni, skrivar ST í nýggju frágreiðingini.